Visit Tórshavn fer at skipa fyri summarátøkum

- Vit hava ein hóp av hugskotum um smærri familjutiltøk og summarátøk ymsastaðni í høvuðsstaðnum, og eitt av hugskotunum er at grilla og kanska hava onkrar smærri familjukappingar á kampingøkinum Yviri við Strond, sigur Beinta Joensen hjá Visit Tórshavn

Vilmund Jacobsen

Tað er ikki bara kring um í Føroyum, at summarið í ár helst verið munandi øðrvísi, enn tað annars hevði verið, um koronafarsóttin ikki kom sum eitt skot og broytti alt.

Soleiðis verður eisini í høvuðsstaðnum, har ein stórur partur av útlendsku ferðafólkunum plagdu at savnast.

Flestu ferðamannaskip, sum skuldu koma til landið í summar, eru avlýst - ella skotin út til einaferð seinni.

Sjóvegis ferðslan hevur at kalla ligið lamin, og flogferðslan hevur koyrt á lægsta blussi.

Øðrvísi summar

Broyttu umstøðurnar merkjast soleiðis eisini hjá Visit Tórshavn, har summarið á nógvan hátt verður øðrvísi.

- Onnur ár hevur kampingplássið Yviri við Strond at kalla verið fult av útlendskum ferðafólki, bæði í mai, juni og juli, men í summar er tað mesta avlýst.

Beinta Joensen hjá Visit Tórshavn ásannar, at hetta verður eitt øðrvísi summar við øðrvísi avbjóðingum og uppgávum hjá kunningarstovuni.

- Men, síðan løgmaður á tíðindafundi herfyri boðaði frá, at Føroyar í ávísan mun nú fara at lata upp aftur fyri útlendskum ferðafólki hin 15. juni, har krøv ikki longur verða um sóttarhald í Føroyum, er okkurt hent.

Hon vísir á, at bara fyrrapartin í gjár fekk Visit Tórshavn einar 10 teldupostar frá útlendingum - serliga dønum og týskarum - sum spyrja seg fyri um eitt nú leigu og kampingmøguleikar.

- Hetta merkir tó ikki, at summarið ikki verið nógv øðrvísi enn tað annars hevði verið. Okkurt bendir tó á, at nøkur útlendsk ferðafólk framvegis droyma um eina ferð til Føroya.

Beinta Joensen sigur, at Visit Tórshavn hevur fingið nógvar avlýsingar og broytingar av bíleggingum, har ferðafólk vóna, at tingini fara at laða seg soleiðis, at tey kunnu koma til Føroya seinni í summar.

- Men, tað er eisini ein partur sum sigur, at vit síggjast næsta ár, leggur hon aftrat.

Tað plagdi at vera eitt rættiligt lív í høvuðsstaðnum, tá ferðamannaskipini komu.

- Sjálvandi er tað ein missur fyri eitt nú flutnings-, matstovu-og handilsvinnuna, at hesi skip ikki koma í summar, men hetta gevur okkum eisini møguleikar at hugsa kreativt og nýskapandi, sigur hon.

Summarátøk

Beinta Joensen sigur, at tey í Visit Tórshavn arbeiða við nógvum ymiskum hugskotum um summarátøk, sum tey fara at boða frá, tá hesi eru komin upp á pláss.

- Vit hava ein hóp av hugskotum um smærri familjutiltøk ymsastaðni í høvuðsstaðnum, og eitt av hugskotunum er at grilla og kanska hava onkrar smærri familjukappingar á kampingøkinum Yviri við Strond.

Hon sigur, at tey á Visit Tórshavn nú hava ein annan "hatt" á høvdinum, har hugsað verður um føroysk ferðafólk, og hvat høvuðsstaðurin kann bjóða føroyskum familjum, sum hava hug at leita sær av bygd og til Havnar.

- Vit vilja hava føroyingar at ferðast til Havnar, bæði børn og vaksin, og vit fara í næstum at siga frá ymiskum møguleikum í hesum sambandi.

Beinta Joensen vísir á, at bæði á gastronomiska økinum og mentanarliga økinum hevur høvuðsstaðurin nógv at bjóða.

- Okkara uppgáva verður at seta sama nøkur summarátøk, sum kunnu draga nógvar føroyskar familjur til Havnar, leggur hon aftrat.

Gistingarmøguleikar

Havnin eigur tey nógvu hotellini, men í høvuðsstaðnum og í Streymoynni sum heild eru eisini summarhús og íbúðir, sum kunnu leigast til familjutúrar, og Visit Tórshavn umsitir fleiri av hesum.

- Nú útlendsk ferðafólk ikki fylla kampingplássið Yviri við Strond, er kampingøkið her eisini eitt frálíkt høvi til gisting, antin í kampingvogni ella tjaldi. Her er pláss fyri umleið 35 vognum og kanska 40 tjøldum - tó við tí fyrivarni, at øllum framvegis verður mælt til at taka atlit.

Húsið við kampingplássið Yviri við Strond hevur allar hentleikar, og her er bæði køkur, vaskimaskina, turkitrumla og uppihaldsstova umframt fleiri wc'ir og brúsur.

- Fólk eru altíð hjartaliga vælkomin at venda sær til Visit Tórshavn, sigur Beinta Joensen.